Dimmalætting

– ÁLÍTANDI TÍÐINDI

Mikudagur
13. januar 1999
Nr. 7
122. argangur

Kr. 8,00

Fíggingargrunnurin nýggja nevnd

John P Danielsen er nýggjur formaður í nevndini fyri Fíggingargrunnin frá 1992. Samstundis, sum gamla nevndin hevur lagt frá sær, hevur hon latið eina frágreiðing um virksemi grunsins síðstu árini.

Heimatíðindi 3

Serlig tiltøk skulu til fyri at hjálpa kvinnum

Neyðugt er við serligum igongdsetanarætlanum og við meira barnaansing, so fleiri kvinnur skulu sleppa út á arbeiðsmarknaðin, segði Karin Kjølbro á fundi í Havnar Kvinnufelag.

Heimatíðindi 6

Butler tekur seg ikki aftur

Leiðarin fyri ST vapnaeftirlitsfelagsskapinum, Richard Butler, visir aftur, at hann hevur ætlanir um at taka seg aftur sum leiðara fyri felagsskapinum, ið skal hava eftirlit við, at irakisku hopoyðingarvapnini verða burturbeind.

Uttanlandstíðindi 8

Fyrrapartin vestan, 10-15 m/s, og turt. Seinnapartin landsynningur-vestan og regn. Hitin um 5 stig.



Ásláttur í masterclass

26 ára gamli klaksvíkingurin Høgni Klakkstein, sum millum annað er kendur úr eksperimenterandi tonleikabólkinum Enek, hevur valt at lata dreymin um at gerast trummuspælari í heimsklassa styra sín livsleið. Hann gongur í lotuni á Los Angeles Music Academy, har lærararnir ikki bara eru hvør, sum helst.

Fyraogtredivu bólkar ætla sær at vera við í Prix Føroyar '99 kappingini, sum byrjar longu um smáar tvær vikur. Í blaðnum í dag er fullfíggjað yvirlit yvir tær fyra undankappingarnar, prát við fyrireikararnar og frásogn um stóru tonleikakappingina.

-Spælistoðin- ella Playstation, sum hon eftur á enskum, fær nú eisini plass í Megabeitinum. Í blaðnum hesaferð verða tey fyrstu spølini til spælistoðina ummæld. Men vanliga heimatekldan er ikki gloymd fyri tað, og Megabeitið hevur umframt at hava spælt við spælistoðina, eisini kannað Voodoo 2 grafikkortið.

Og í Kykmyndahøllini er umrøða av nýggja filminum -Enemy of the States-.

KRDD

Høgt spæl um svartkjaft

Svartkjafturin í føroyskum sjógvi fer at avgera lagnuna hjá fleiri av nýggjastu fórunum í føroyska flotanum. Alt bendir á, at tá vit eftir ár 2000 fara til samráðingarborðið við russar, norðmenn og ES mugu velja millum tvær loysnir – antin at avhvørva nótaflotan ella flakatrolararnar

GEORG I. PETERSEN

Kemur svartkjafturin í føroyskum sjógvi undir eina kvotaskipan ár 2000, sum alt bendir á, fer tað at ganga hart út yvir flotan. Fáa vit 200.000 tons, sum væntað, verður einki at keypa tosk fyri frá russum, norðmonnum og ES - í dag keypa vit tosk fyri 190.000 tons av svartkjafti. Afturat hesum kunnu íslendingar fiska fritt í føroyskum sjógvi, eins og vit kunnu í teirra. Sostatt er talan um eitt undirskot av svartkjafti eftir ár 2000.

Svartkjafturin, sum fekk so ringt orð á sig í 80-árunum í sambandi við svartkjaftaævintyrið, er eitt tað virðismesta tilfeingið í føroyskum sjógvi. Í 80-árunum vóru stórar ætlanir um at fiska til matna, men einki bar til. Men stóru nótabátarnir hava framvegis svartkjaftin sum ein tydningarmiklan part av teirra veiðu, sum eisini er makrelur og síld.

Allir nótabátarnir í føroyska flotanum hava í dag svartkjaftalovvi. Talan er um Norðborg, Krunborg, Jupiter, Finn Friðja, Trond í Gotu, Christian í Grótinum, Saksaberg og Jón Sigurðsson. Øll gera ikki nytslu av lovvinum, tí skipini ikki megna at fiska svartkjaftin. Men ætlanir eru um fleiri nýgg skip. Afturat hesum hava skipini 60.000 tons í ES sjógvi.

Tað er NEAF, sum ásetir mest leyvdu fiskiveiði á okkara øki og norðurhøvum annars. Ein mest loyvda veiða, ella TAC, er ásett, men hevur onga ávirkan, tí veiðan er ikki bytt millum londini. Tí er fiskiskapurin friur. Ásetta TAC-ið er 650.000 tons fyri alt NEAF-økið, og tað er hetta, sum seinni skal bytast.

Men gravgangurin eftir svartkjafti og at vinna sær sógulig rættindi er stórur. M.a. fiskaði Noreg eina samalt meira enn tey ásettu 650.000 tonsini í farna ár. So har verður ikki nógv í part, hóast samlaða veiðan verður hækkað, um norðmenn fara at seta hart móti harðum.

Fyri at verandi skip og møguligir avloysarar í nótaflotanum skulu kunna bera seg, hava tey brúk fyri umleið 200.000 tonsum av svartkjafti samanlagt. Men hetta kemur í álvarsliga motsøgn við tann samráðingarpolitikk, sum Føroyar hava móttvegis ES, Noregi og Russlandi, tí vit hava altið latið svartkjaft afturfyri tosk.

Í lotuni hava russisk skip rætt at fiska 120.000 tons av svartkjafti í føroyskum sjógvi, norsk skip 40.000 tons og ES skip 30.000 tons. Longu her kemur veiðan uppímoti 200.000 tonsum, eins fjast tí tey føroyska nótaskipini hava brúk fyri. Har verður einki eftir.

Vit royndu í gjár at fáa fatur á Jørgin Niclasen, landsstýrismanni, og Jákup Sólstein, formanni í Føroya Reiðarafelag, men hvørgin var at hitta.

Føroyingar við í The Faroes Partnership

Hygg væl eftir fløskuni mitt á borðinum. Tað, sum er í henni, er orsøkin til, at hesir menninir vóru so fróir í gjár. Nevniliga olja

LEIF LAXDAL

Privata føroyska oljufelagið Atlantic Petroleum er nú partur av oljusamtakinum The Faroes Partnership. Í gjár skivaðu stjórar, leiðarar og partaeigarar undir avtaluna, sum inniber, at føroyska felagið ikki longur stendur einsamalt í avgerðum sínum, tá ið føroyska oljuævintýrið byrjar.

Atlantic Petroleum er fimti «partnarin» í samtakinum, og hevur hetta við sær, at umboð fyri felagið koma at sita til borðs saman við teimum, ið taka tær stóru avgerðirnar, sum stjórin hjá Atlantic Petroleum, Wilhelm Petersen (standandi), tók til.

Føroyingar væntá sær nógv av samstarvinum, eitt nú hevur felagið nú lættari við at greina møguligum nýggjum partaeigarum frá, hvat tað er, arbeitt verður við. Hetta fer vónandi at hava við sær, at tey nýggju partabrevini, sum verða bjóðað út skjótt, fara at fáa bein at ganga á.

Lesið á síðu 6

Umboð fyri tey fyra felogini, sum higartil hava myndað The Faroes Partnership, siggjast her vinstrumegin, meðan føroyingar mannsterkir sita hógrumegin. Avtalan er undirskrivað og nú eru fimm felog í samtakinum

Mynd: Kallur

Semja í apríl um undirgrundarmarkið

Nú er komið so langt áleiðis við samráðingunum millum Føroyar og Bretland, at ein avgerð fæst á áralongu hólmgonguni innan leingi

INGI RASMUSSEN

Ein kelda, sum Dimmalætting hevur tosað við, sigur, at avtalan um undirgrundarmarkið við Bretland helst kemur upp á plass fyrst í apríl mánaði.

Føroyski samráðingarleiðarin, Arni Olafsson sigur, at um alt gongur uttan stórvegis trupulleikar, so kann møguliga staðfestast í apríl, at partarnir eru samdir.

– Men ein semja er ikki fingin í lag, fyrr enn vit eru samdir um alt – og tað eru vit ikki enn, leggur Arni Olafsson staðliga dent á.

Dimmalætting skilir, at semjan millum partarnar hevur við sær, at fiskimarkið verður varðvett.

Partarnir hava í staðin samrátt seg fram til eitt kompromis, ið ásetir markið á undirgrundini, sum víkur frá fiskimarknum millum londini.

Eftir ollum at døma leggur undirgrundarmarkið seg í nánd av miðlinjuni.

Føroyski samráðingarleiðarin, Arni Olafsson, vil kortini ikki vattað sláskar detaljur á núverandi stug.

Men hann visir samstundis á, at føroyska støðan hevur alla tíð verið, at ein loysn, sum ikki virðir miðlinjuprinsippið onkursvegna, heldur ikki kann góðtakast.

Hans Biskopstø nýggjur landsverkfrøðingur

Finnbogi Arge, landsstýrismaður, hevur eftir áheitan frá starvsfólkunum á Landsverkfrøðingínum sett Hans Biskopstø í starv sum Landsverkfrøðingur

Eftir at hava havt nakað ogreið stjóraviðurskifti í eina tíð, avgjørdi Finnbogi Arge at seta ein av royndu starvsfólkunum á Landsverkfrøðinginum í starvið sum stjóri á stovninum.

Umframt at hava dagligu leiðsluna skal stjórin standa fyri útgreiningum og kanning av virksemínum hjá stovninum, herundir at lýsa møguligar bygnaðartillagingar og rationaliseringar. Hans Biskopstø er 66 ára gamal, og hevur starvast á stovninum síðan 1964 sum yvirverkfrøðingur og deildarleiðari fyri maskindeildina.

Dimm
ADR.:
www.dimma.fo
Lesið tíðindi á Interneti
– dag sum nátt –
HVØNN DAG

Tín skjótasta farmaleið!
Úr Føroyum hvønn friggjadag
Úr Danmark hvønn leygardag
pf. SMYRIL LINE
Tel 31 59 00

CLUB 20
Hósk. 14.01 DJ - Kári Berg
Friggjak. 15.01 DJ - Bjarni Mohr
Leygark. 16.01 DJ - Róni Kjær
Sunnuk. 17.01 DJ - Róni Kjær
Happy Hour hvørt kvøld
Ladies Night hvørt friggjakvøld
Tel 31 56 28
www.club20.fo

– Fyrimunurin er tann, at nú hava vit atgongd til bæði føroysk fólk og føroyska vitan í Føroyum, segði Richard Hardman, leitingarstjóri hjá Amerada Hess, eftir at avtalan um, at Atlantic Petroleum í framtíðini skal verða ein partur av The Faroes Partnarship, var undirskivað í gjár Mynd: Kalmar

Triggir tungir dreingir í føroyska vinnilívinum og nú eisini í The Faroes Partnership, frá vinstru: Poul Mohr, Mortan Johannesen og Oli Hammer Mynd: Kalmar

Atlantic Petroleum saman við teimum stóru

Privata føroyska oljufelagið Atlantic Petroleum legði í gjar saman við teimum fýra felagunum, sum arbeiða undir navninum Faroes Partnership. Avtalan inniber, at Atlantic Petroleum nú er javnstillaður «partnari» í føroyska oljusamtakinum

LEIF LAADAL

– Hetta er ein stór løta. Ikki bara fyri okkum, men fyri alt føroyska samfelagið, segði ein av teimum stóru partaeigarunum í Atlantic Petroleum, Poul Mohr, á tíðindafundinum í hølunum hjá The Faroes Partnership í gjár. Orsøkin til ta stóru løtuna, sum Poul tosar um, er, at føroyska oljufelagið Atlantic Petroleum nú tekur upp samstarv við Amerada Hess, Lasmo, Norsk Hydro og DONG. Samstarvið hevur við sær, at føroyska felagið ikki stendur einsamalt, nú føroyska oljuævintyrið stendur á gáttini til eina byrjan.

Eingin politiskur fyrimunur

Stóri spurningurin er so, hví The Faroes Partnership tekur upp samstarv við eitt pinkufelag úr Føroyum, ið hevur tað sama í partapeningi, sum eitt av hinum felagunum brúkar til at pussa vindeygunum í kontórbygningum sínum árliga.

Richard Hardman frá Amerada Hess dýlir heldur ikki yvir, at samtakið nú stendur sterkari og samstundis hevur ein fyrimun í Føroyum, men hann leggur dent á, at fyrimunurin ikki er yvirfyri landsstýrinum, tá eitt nú oljuleiðirnar undir Føroyum skulu býtast.

– Fyrimunurin er tann, at nú hava vit atgongd til bæði føroysk fólk og føroyska vitan í Føroyum, sigur Richard Hardman, leitingarstjóri hjá Amerada Hess.

– Føroyska felagið kann hjálpa okkum á nøkrum sera týdningarmiklum økjum, eitt nú umhvørvi, fiski og trygd, sigur Richard Hardmann.

Afturfyri fara tey fýra felagini, sum higartil hava myndað The Faroes Partnership, at hjálpa Atlantic Petroleum at menna seg.

Ikki so stóran vága

Kjartan Hoydal er nevndarformaður í Atlantic Petroleum og hann heldur, at partaeigararanir, sum higartil eru 800 í tali og umboða tær 28,9 millónirnar, hava fingið eina góða avtalu.

– Hetta er ein reint vinnulig avtala, sum ger, at vit nú ikki standa einsamøll, tá ið peningurin mennist, sigur Kjartan Hoydal, sum vegna partaeigararnar nú kann gleða seg um tann minni vaga, sum felagið í framtíðini skal arbeiða undir.

Sjálvt arbeiðsøkið hjá Atlantic Petroleum í samtakinum verður í fyrstuni at fyrireika fyrsta útbjóðingarumfar.

– Vit fara at taka aktivan lut í at bjóða uppá teir fyrstu blokkarnar, sigur Kjartan Hoydal.

Meiri eginpening

Atlantic Petroleum hevur fingið loyvi at hækka partapeningin upp í 55 millionir, og nevndarformaðurin sær nakrar heilt greiðar fyrimunir við hesum samstarvinum, tá ið talan er um møguleikarnar at sleppa av við tey partabrøv, sum nú verða tøk.

– Hetta samstarv hjálpir okkum at gleiða fólki frá, just hvat tað er, ið vit fáast við, og harafturat fer tað vónandi hjálpa okkum, tá ið tey nýggju partabrøvini verða boðin út, sigur Kjartan Hoydal.

Umboð fyri nakrar av teimum, sum longu hava sett pening í Atlantic Petroleum, og eisini manna nevndina, voru við á tíðindafundinum. Poul Mohr minti á, at felagið var eitt vinnurekandi felag og hevði einki við hansara arbeiðsplass. Skipasmiðjuna at gera, meðan Mortan Johannesen tosaði um, at føroyingar nú mátti venja seg við, ikki at arbeiða eftir einum leisti.

– Allur peningurin plagar at verða settur í fiskivinnuna, men tað vísir seg, at tey felóg, sum arbeiða í hesi vinnu, sjáldan megna eitt ættarskifti, segði Mortan Johannesen, sum minti á, at samfelagið stendur sterkari, um ikki alt er tengt at tí eini vinnuni.

Meira útbúgving og meira barnansing

Næstan tveir triðingar av øllum arbeiðsleysum í ndinum eru kvinnur. Fyri at bøta um hetta skeiva býtið er neyðugt við serligum og igongdsetaraætlanum til kvinnur, og fleiri barnaansingartilboð skulu til

RANDI JACOBSEN

Tað er ikki nakað serføroyskt fyribrigði, at kvinnur verða harðari raktar enn menn av arbeiðsloysi. Soleiðis er eisini aðrstaðni, og tosað verður um proletarisering av kvinnum.

Lika síðan arbeiðsloysisskipanin kom í Føroyum í 1992, hevur stórri helvtin av arbeiðsleysum í Føroyum verið kvinnur, og í august í fjør var býtið millum kynini so skeivt, at tveir triðingar av øllum arbeiðsleysum voru kvinnur og ein triðingur menn.

Nýggastu tølini, frá januar mánaði í ár, eru eitt sindur fragari: 59% kvinnur og 41% menn. Tí tað er at viðmerkja, at hesin mánaðurin altið er ring arbeiðstíð hjá monnum, við tað at nógv mannfolkaarbeiði liggur stilt orsakað av veðrinum, ikki minst er lítil utroður.

Mánakvøldið hevði Kvinnufelagið í Havn fund í Mettustovu, og har greiddi Karin Kjølbro, sum er forkvinna í stýrinum fyri ALS, út frá hagtølunum frá tí skeiva kynsbýtinum, og hon tosaði eisini um, hví kvinnurnar hava verri við at sleppa upp í part á arbeiðsmarknaðinum.

Hagtølini vísa, at 75% av øllum kvinnum og 85% av øllum monnum í vinnuførum aldri eru á arbeiðsmarknaðinum.

Broyttur hugburður

Hugburðurin hjá kvinnunum í Føroyum er nógv broyttur hesi seinastu 25 árini, sum Karin umrøddi á fundinum. Í 70-arunum var ikki arbeiðsloysi her, og tá komu javnan utlendsk tíðindafólk at vitja hetta í so mata góða landið. Nógvar samrøður voru gørdar við kvinnur á flakavirkjunum, og tær hildu tað vera gott bara at arbeiða í tveir dagar í senn og so hava frí. Møguligur arbeiðsloysisstuðul varð ikki nevndur. Tær sóu inntøku sína sum eitt gott iskoyti til lønina hjá mannnum.

– Neyvan hevði nøkur føroysk kona málborið seg soleiðis í dag, segði Karin.

Í 70- og 80-arunum var arbeiði til øll í Føroyum, og tað stóð so væl til, at tey brekaðu fyri ein part kundu fáa arbeiði.

Men seinast í 80-árunum fór at ganga hin vegin, og í 1992 varð Arbeiðsloysisskipanin stovnað, tí tá var vælferðarsamfelagið hótt.

Arbeiðsloysið var 25%, tá tað var ringast, men seinasta árið hevur taðligið um 7%, ið ikki verður roknað sum arbeiðsoysi aðrastaðni. Aftrat koma tey arbeiðsleysu, sum ikki kunnu fáa forsorgarhjálp, um hjúnarfelagin hevur inntøku, ella tey eiga innistandandi.

Sparingarnar, sum tað almenni setti í verk beinanvegin, tá kreppan fór at gera um seg, raktu kvinnurnar hart, tí fleiri arbeiðsplass hvurva, og skorið var niður í arbeiðstíðini á almennum arbeiðsplássum.

Tað er serliga í aldurbólkinum frá 20 til 39 ár, at kvinnurnar hava stóra yvirvág sum arbeiðsleysar, t.v.s. tær í burðardygga aldrinum.

Páparnir eisini eisini børnini

Kvinnur verða av summum arbeiðsgevarum ikki roknaðar fyri at vera nóg álitandi arbeiðsmegi, tá tær hava smábørn, tí tá børnini eru sjúk, noyðist mamman ofta at vera heima.

Á fundinum mánakvøldið hildu fleiri, at tað nú hendir oftari og oftari, at pápar eisini eru heima hjá sjúkum børnum. Konurnar hava líka abyrgdarfull størv sum menninir og kunnu líka so lítið sum teir loyva sær at vera ov nógv burtur frá arbeiði. Tað kemur væl við hjá kvinnunum, at menninir eisini eru heima vegna sjúk børn, tí harvið verður forstailisi størri fýri tí at hava børn.

Tosað varð eisini um andsøgnina, at vit hava arbeiðsloysi, men kortini gongur illa hjá fiskavirkjunum at fáa fólk. Virkiseigarar hava sagt, at yvirlitini teir fáa frá ávisingini yvir arbeiðstøk fólk, eru ikki eftirfarandi, tí øll hesi fólkini eru ikki tøk. Ein kvinna, sum ikki sleppur til arbeiðis, tí hon skal ansa børnumella gomlum, er ikki tøk. Haraftrat er lítil áhugi millum arbeiðsleys fyri fiskaarbeiði, visti eitt umboð fyri Arbeiðsoosysisskipanina at siga á fundinum.

Fleiri fundarluttakarar tóku fram spurningin um barnaansing. Kvinnur við smábørnum kunnu ikki vera tøkar, tá tær ikki fáa børnini ansað, og tað er so trupult at fáa barnaansingarpláss.

Og tað verður bara torførari og torførari, jú meira virksemið nú økist.

Ein fundarluttakari hevði hetta boð uppá, hvussu fleiri barnansingarpláss kunnu útvegast:

– Konurnar eiga at trýsta menninar, soleiðis at vantandi barnansing eisini verður teirra trupulleiki, tí upp á tann mátan verður mátið oivað prioriterað hægri.

Ungar mammur

Hesi seinastu árini hava vit fingið ein stóran bólk av ungum kvinnum við ongum arbeiði. Tá tær eru lidnar við skúlanum, er einki arbeiði til teirra. Tær fáa so børn, og so ber als ikki til fáa arbeiði.

Onkur var inni á, at ALS atti at skipað fyri tiltøkum fyri hesar kvinnum, men aðrar hildu, at hetta fellir uttan fyri ALS, við tað at ALS er ein tryggingarskipan fyri partarnar á arbeiðsmarknaðinum. Ungar kvinnur, sum koma beint úr skúlanum, hava einki við arbeiðsmarknaðin at gera.

Karin harmaðist støðuna hjá hesum ungu mammunum, sum oivað í royndini at finna ein identitet, fáa børn tíðliga.

– Hesa idealiseringina av børnum haldi eg vera eina brotsgerð móti teimum ungu kvinnunum, tí tað kostar eisini blóð, sveitta og tár at standa einsamøll við børnum og við ongum pengum, segði Karin.

Stuðul til at fara í gongd

Nú eru næstan 20 ár liðin, síðan tær í Kvinnufelagnum í Havn fór at tosa um at gera eina igongdsetanarætlan fyri kvinnur. Í 1980 varð farið at savna inn pening til ein slíkan stuðulsgrunn. 150.000 krónur standa á bók. Tá tær byrjaðu, var rentan høg, og tær væntaðu, at eftir fáum árum fór at bera til hjá grunninum at veita stuðul til kvinnur, sum ætlaðu sær í gongd við onkrum, men vantaðu figging. Men so hendi tað, at rentan fall, og vit fingu figgjarognaravgjald, so stovnsfæið veksur ógvuliga seint.

Fleiri á fundinum tóku undir við, at tað hevði komið væl við hjá nógvum kvinnum, um tað fanst ein igongdsetanaratlan, tí tað eru dømi um kvinnur, sum vegna vantandi figging ikki sleppa í gongd. Og fáa tær ikki børnini ansað, ber als ikki til.

– Tað er so lítið, sum skal til, at tað munar nógv.

Góðar royndir

Karin Kjølbro hevði nøkur góð tíðindi at siga frá Arbeiðsloysisskipanini, og tað var viðvikjandi arbeiðinum at eggja arbeiðsleysum til at fara á skeið, sum geva teimum stórri møguleiki at fáa arbeiði.

Tá ALS byrjaði, snúði alt seg bara um, at ALS rindaði so og so nógv til arbeiðsleys, men í august í ár kom tann skipan, at aftana hálvt ár í skipanini skulu øll arbeiðsleys til samtalu, og tey skulu hava arbeiðsgevandi skeiðtilboð.

– Vit hava góðar royndir av hesi skipanini, og dømini eru nógv um kvinnur, sum hava fingið arbeiði, segði Karin.

Tað vóru ikki serliga vøkur tøl, sum Karin Kjølbro hevði at kunngera um støðuna hjá kvinnunum á arbeiðsmarknaðinum. Karin hevði nógvar viðmerkingar til hagtølini, tí umframt at vera forkvinna í ALS-stýrinum hevur Karin nógva vitan um arbeiðsmarknaðin frá arbeiði sínum sum sosialráðgevi, og hon hevur sum kunnugt eisini verið politikari Mynd: Kalmar